UTTANRÍKISRÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS

Løgtingið

Tórshavn 2. mars 2010
Mál: 770-037/09

**Løgtingsmál nr. 111/2009: Uppskot til samtyktar um at seta í gildi sáttmála um vísindaligt og tøkniligt samstarv millum Evropasamveldið og Føroya Landsstýri**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at landsstýrið tekur stig til, at sáttmáli frá 01.01.2010 um vísindaligt og tøkniligt samstarv millum Evropasamveldið og Føroya Landsstýri verður settur í gildi í Føroyum.

## Viðmerkingar

*1. Alment um sáttmálan*

Sum liður í menningini av føroyska samfelagnum er tað av alstórum týdningi, at Føroyar fáa atlimaskap í FP7. Sáttmálin gevur føroyingum møguleika at luttaka í ES-granskingarsamstarvinum á jøvnum føti við granskarar úr ES/EBS-limalondunum. Tað merkir, at føroyskir granskarar í sambandi við útboð av verkætlanum og umsókn um stuðul úr ES-granskingargrunninum virka undir somu fyritreytum, sum granskarar úr ES-limalondunum og hinum atlimalondunum í granskingarsáttmálanum.

Granskingargrunnurin er upp á umleið 380 mia. krónur. Føroyskir granskarar kunnu longu nú søkja um stuðul til verkætlanir. Útgjaldið er tó treytað av, at sáttmálin verður settur í gildi.

Atlimaskapur í FP7 hevur eisini við sær, at føroysk umboð, saman við umboðum úr hinum luttøkulondunum, eru við til at skipa tær nevndir, ið stinga út í kortið leiðreglur fyri evropiskum granskingarsamstarvi. Tað er ein avgjørdur møguleiki at skapa menning og vekja áhuga fyri Føroyum í breiðum týdningi.

Mett verður, at umframt granskingarumhvørvið, fyritøkur og stovnar, ið beinleiðis fara at fáa gagnnýtt møguleikarnar í FP7, fer atlimaskapurin at hava stórar samvirkandi fyrimunir á menningina av føroysku vinnuni og føroyska samfelagnum. Serliga innan landafrøði, arvafrøði, umhvørvi, mál og mentan eru Føroyar serstakar í granskingarhøpi, og við øktu samstarvsmøguleikunum, ið fylgja við atlimaskapi í FP7, er grundarlag fyri, at Føroyar gerast ein granskingarmagnetur fyri útlendskar granskarar eisini. Stór sannlíkindi eru sostatt fyri, at økta granskingin í Føroyum og økta granskingarsamstarvið við ES fer at síggjast aftur í menningini av kappingarføri innan fiski- og alivinnuna, heilsuøkið, útbúgvingarøkið, tøkni, búskap, og náttúruvísindi.

At gerast atlimur í FP7 er eitt politiskt og løgfrøðiligt gjøgnumbrot í samstarvinum Føroyar-Danmark-ES millum. Hesin sáttmáli kann sum løgfrøðiligur frymil verða eitt fordømi upp á sáttmálar við ES á øðrum økjum, ið hava týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum, samstundis sum at Føroyar í størri mun kunnu taka lut í samansjóðingini í Evropa.

*2. Forsøga*

Eftir áheitanum frá politiska kervinum og granskingarumhvørvinum í Føroyum varð samband tikið upp við Evropanevndina, DG Research, í 2004, til tess at slóða fyri at fáa í lag formligt granskingarsamstarv millum Føroyar og ES. Í árunum 2004-2006 var ein røð av fundum partanna millum. Á sumri 2007 komu boð frá embætisverkinum í ES um, at mett varð ikki, at føroyskur atlimaskapur í FP7 var ynskiligur frá ES síðu. Serstakliga var víst á løgfrøðiligar trupulleikar at gera sáttmála við Føroyar. Tó eydnaðist tað føroysku uttanríkistænastuni at fáa vent gongdini aftur, og málið varð tikið upp á politiskt stig í ES. Á fundi við Evropanevndarlimin í granskingarmálum, Janez Potocnik, í desember mánaði 2007, gav nevndarlimurin politiska tilsøgn um, at hann stuðlaði føroyskum atlimaskapi í FP7, og at fyrireikingarnar skuldu byrja beinanvegin.

Eftir niðurstøðuna hjá Evropanevndarliminum Potocnik varð málið beint til innanhýsis viðgerð í Evropanevndini, sum síðani heitti á Ráðharraráðið um at fáa samráðingarheimild til at taka upp samráðingar við Føroyar. Samráðingarheimildin varð fingin til vega í mai mánaði 2009; tó høvdu partarnir óformligar samráðingarfundir áðrenn hetta til tess at tryggja sær, at so nógv, sum gjørligt, var komið undir land, tá farast kundi undir formligu samráðingarnar. Í juli mánaði 2009 varð sáttmálin stavváttaður av pørtunum báðum.

*3. Løgfrøðilig viðurskifti*

Løgfrøðiliga tænastan hjá Evropanevndini *(Legal Service)* er komin til ta niðurstøðu, at í grundregluni er tøkniliga rættast at fremja føroyskan atlimaskap í FP7 við millumtjóðasáttmála millum Føroya Landsstýri øðrumegin og Evropasamveldið (ES) hinumegin. Løgfrøðiliga tænastan hevur annars fleiri grundleggjandi fyrivarni fyri øðrum sáttmálaloysnum.

Granskingarsáttmálin kann tískil eftir hesi løgfrøðiligu niðurstøðu einans verða gjørdur samsvarandi grein 1 í "Lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera", ið er einans virkin fyri yvirtikin málsøki. Hugverksrættur, haruppií upphavsrættur og ídnaðarhugverksrættur eru millum grundleggjandi málsøkini, ið sáttmálin fevnir um, og mega tískil vera yvirtikin. Upphavsrættur varð yvirtikin 1. januar 2010. Fyrireikingarnar um yvirtøku av ídnaðarhugverksrættin eru byrjaðar. Løgmansskrivstovan stendur fyri at fyrireika

yvirtøkulógaruppskot, meðan avvarðandi stjórnarráð standa fyri at tingast við avvarðandi donsk stjórnarráð um yvirtøkur og fyri at umsita málsøkini, tá ið tey eru yvirtikin. Tey eru Mentamálaráðið viðvíkjandi upphavsrætti og Vinnumálaráðið viðvíkjandi ídnaðarhugverksrætti.

Sáttmálarættur við atknýttum felagsskapsrætti at seta í gildi í Føroyum er endurgivin í skjølum til uppskotið.

*4. Fíggjarligar avleiðingar*

Granskingarsáttmálin fer at hava fíggjarligar avleiðingar við sær við fyriliti fyri luttøkugjaldi í FP7. Útrokningar hjá ES, ið eru grundaðar á tøl frá Hagstovu Føroya, vísa, at árliga luttøkugjaldið í miðal fer at liggja um 9 mió. kr. fyri árini 2010-2013. Frymilin, ið nýttur verður at rokna hetta gjald eftir, er:

$$\frac{\text{BTÚfo}}{(\text{BTÚeu27}+\text{BTÚfo})^{*}}$$

Luttøkugjaldið fyri 2010 er 6.92 mió DKK. Semja er í landsstýrinum um, at fígging eftir ætlan verður fingin til vega við fyrstu eykajáttanarlóg.

*5. Eftirlit*

Sambært fylgiskjali IV kunnu Føroyar, um ynski er frá føroyskari síðu, at føroyskur myndugleiki luttekur í stakkaningum av granskingarverkætlanum í Føroyum, ið verða fíggjaðar gjørnum FP7-granskingarskránna, vísa ES myndugleikum á føroyskan myndugleika, ið kann átaka sær hesa uppgávu. Í samráð við Landsgrannskoðanina verður lagt upp til, at tað verður hesin stovnur, ið heitt verður á í slíkum førum.

*6. Yvirlit yvir innihald*

Sáttmálin hevur 5 greinar við hesum høvuðsinnihaldi:

- Grein 1-3 er um almennu reglur og skyldur Føroya og ES sum sáttmálapartar
- Grein 4 er um felagsnevndina Føroyar – ES, ið verður sett á stovn, og uppgávur hennara
- Grein 5 er um fíggjarlig viðurskifti, luttøkutreytir og skyldur

*7. Ummæli*

Sáttmálin hevur verið til ummælis hjá Mentamálaráðnum og Granskingarráðnum. Harumframt hevur ráðførsla verið við Vinnumálaráðið um at yvirtaka ídnaðarhugverksrættin, við Mentamálaráðið um yvirtøkuna av upphavsrættinum, og við Landsgrannskoðanina um at veita møguliga hjálp í sambandi við eftirlit.

* Føroyska BTÚið at býta við samlaða úrslitið av BTÚnum hjá teimum 27 ES-limalondunum + føroyska BTÚið

*8. Skjøl*

Skjal 1: Agreement on Scientific and Techonoligcal Cooperation Between the European Community and the Government of the Faroes

Skjal 2: REGULATION (EC) No 1906/2006 OF THE EUROPEAN PARLIAMENT AND OF THE COUNCIL of 18 December 2006 laying down the rules for the participation of undertakings, research centres and universities in actions under the Seventh Framework Programme and for the dissemination of research results (2007-2013)

Skjal 3: Decision No 1982/2006/EC of the European Parliament and of the Council of 18 December 2006 concerning the Seventh Framework Programme of the Euorpean Community for research, technological development and demonstration activities (2007-2013)

Skjal 4: COUNCIL DECISION 2006/971/EC of 19 December 2006 concerning the Specific Programme “Cooperation” implementing the Seventh Framework Programme of the European Community for research, technological development and demonstration activities (2007 to 2013)

Skjal 5: COUNCIL DECISION 2006/972/EC of 19 December 2006 concerning the specific programme: “Ideas” implementing the Seventh Framework Programme of the European Community for research, technological development and demonstration activities (2007 to 2013)

Skjal 6: COUNCIL DECISION 2006/973/EC of 19 December 2006 concerning the specific programme ‘People’ implementing the Seventh Framework Programme of the European Community for research, technological development and demonstration activities (2007 to 2013)

Skjal 7: COUNCIL DECISION 2006/974/EC of 19 December 2006 on the specific programme: ‘Capacities’ implementing the Seventh Framework Programme of the European Community for research, techonoligcal development and demonstration activities (2007 to 2013)

Skjal 8: COUNCIL DECISION 2006/975/EC of 19 December 2006 concerning the specific programme to be carried out by means of direct actions by the Joint Research Centre under the Seventh Framework Programme of the European Community for research, technological development and demonstration activities (2007 to 2013)

Skjal 9: COUNCIL DECISION 1999/468/EC of 28 June 1999 laying down the procedures for the exercise of implementing powers conferred on the Commission

Skjal 10: COUNCIL REGULATION (EC) No 1083/2006 of 11 July 2006 laying down general provisions on the European Regional Development Fund, the European Social Fund and the Cohesion Fund and repealing Regulation (EC) No 1260/1999

Skjal 11: COUNCIL REGULATION (EC, Euratom) No 1605/2002 of 25 June 2002 on the Financial Regulation applicable to the general budget of the European Communities

Skjal 12: COMMISSION REGULATION (EC, Euratom) No 2342/2002 of 23 December 2002 laying down detailed rules for the implementation of Council Regulation (EC, Euratom) No

1605/2002 on the Financial Regulation applicable to the general budget of the European Communities

Skjal 13: COUNCIL REGULATION (Euratom, EC) No 2185/96 of 11 November 1996 concerning on-the-spot checks and inspections carried out by the Commission in order to protect the European Communities' financial interests against fraud and other irregularities.

Skjal 14: COUNCIL REGULATION (EC, Euratom) No 2988/95 of 18 December 1995 on the protection of the European Communities financial interests

Tórshavn 2. mars 2010

Jørgen Niclasen
uttanríkisráðharri

/

Herluf Sigvaldsson
aðalstjóri